


### Jakob Jakobsen:

# Yrkti ein tann fyrsta føroyska sálmin

**Jakob Jakobsen úr Havn var fyrst og fremst lærari. Men hann var kendur sum ein av fremtu urtagarðsmonnum og kønur innan ætt. Hann var eisini ein av okkara fyrstu sálmayrkjarum**




**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo


Jakob Jakobsen var føddur 28. mars 1853 í Tórshavn. Foreldur hansara vóru Hans Christoffer Jacobsen, bóndasonur av Húsum í Havn og Armgardt Marie Christine f. Wenningstedt úr Havn. Ein pápabeiggi Jakob var tann gamli Just Jacobsen á Húsum, sum var abbi tann Just Jacobsen, sum var við til at kalla inn til kenda jólafundin í 1888.

Jacob fór 17 ára gamal á læraraskúla í Havn í 1870, og hann tók lærarapróvg í 1872. Hetta var fyrsta hold, sum tók lærarapróvg í Føroyum. Hann fór sum so mangur lærari niður á háskúla, og hann var í Testrup.

Heimafturkomin var hann lærari í Miðvági og Sandavági, annan hvønn dag í hvørjum stað. Í fleiri ár var eingin skúlabygningur í Miðvági. Hann helt so skúla í gomlum húsum niðri í Toft. Í Sandavági var ikki skúli bygdur fyrr enn nógv ár seinni.

Ein av næmingunum hjá Jakob var Rasmus Rasmussen á Háskúlanum. Jakob hevði góðar royndir frá háskúla í Danmark, og hann eggjaði Rasmussi at gera tað sama.

So Jakob kann kanska sigast at hava verið ein av andaligu fedrunum hjá føroysku háskúlarørsluni.

Úr Vágum fór Jakob til Tvøroyrar, har hann var fyrstilærari. Hann var fyrsti havnarmaður, sum var lærari á Tvøroyri, har hann hevði skyldfólk. Fastur hansara Súsanna (1817-1889) var gift við gamla Johan Mortensen (1816-1879), keypmanni og stórreiðara. Tey vóru foreldur til Niels J. Mortensen, sum var abbi tann Niels Juul Mortensen, sum vit minnast.

Í 1879 giftist Jakob við Onnu Kjelnæs, dóttir Thomas Juel Kjelnæs, skómakara úr Havn og Henrikku Nolsøe úr Nólsoy. Tey eru fyrr umrødd í hesi røð.

Tey bæði fingu eingi børn, men tey fostraðu tvær gentur upp. Onnur var úr Havn og hin úr Gásadali. Báðar giftust tíðliga burtur.

Sum undanfarnir lærarar búði Jakob Jakobsen fyrst í vestara endanum í skúlanum. Í 1916 komu serlig hús til fyrstalæraran, men tað var bert stutt tíð, hann fekk búð í teimum. Sama ár varð hann vegna eygnasjúku eftir umsókn loystur úr embætinum. Hann flutti til Havnar, har hann bygdi sær hús ovast í Tórsgøtu. Her búði hann í 16 ár, til hann doyði í desember 1932, nærum 80 ára gamal. Konan doyði í 1939.

Tað er ikki nógv, sum vit vita um Jakob sum lærara. Men Jóhs. Andr. Næs endurgevur næming, sum segði um hann: "Jakob Jakobsen var ein lærari, tú aldri gloymir."



*Jakob og Anna, gentan er helst ein fosturdóttir*

### Urtagarður og ætt

Jacob gjørdist eisini kendur fyri síni ítriv. Tað fyrra var urtagarðsvirksemi, sum hann fekst við bæði í Vágum og Tvøroyri. Innast við grótveggin í skúlanum á Tvøroyri gróðursetti hann runnar (snjóber). Longri niðri setti hann ahorntrø og í sjálvum urtagarðinum ymiskar blómur. Tá vóru ikki nógvir urtagarðar á Tvøroyri. Men tað er ikki at ivast í, at fleiri av teimum, sum seinni hava fingið sær urtagarð, hava havt hendan urtagarðin sum fyrimynd.

Í nøkur ár undir seinna heimsbardaga og aftaná høvdu nakrir flokkar av skúlabørnum hendan urtagarð í hondum. Hvør næmingur átti eitt petti, sum hann røkti og gleddist um. Seinni er urtagarðurin horvin undir útbyggingum.

Jakob Jakobsen gjørdi eitt stórt kanningararbeiði um sína ætt. Hetta arbeiði ið røkkur aftur til umleið 1470. Sum ættargranskari var hann tiltikin bæði í Suðuroy og norðanfyri. Mongum hjálpti hann at finna sínar røtur.

### Jólaklokkan aftur ringir

Í bókini "Jólaklokkan aftur ringir" greiðir Jóhannes Andreas Næs frá teimum tveimum fyrstu sálmunum, sum eru yrktir av føroyingum.

Í desember 1891 stendur í Føringatíðindi sálmurin "Gleðilig jól," yrktur av Frederik Petersen. Í februar 1892 stendur í Færøsk Kirketidende jólasálmurin "Jólaklokkan aftur ringir" hjá Jakob Jakobsen. Tað er væl hugsandi, at báðir sálmar eru yrktir til jólini 1891. Teir kunnu tí roknast fyri at vera fyrstu føroysku jólasálmar.

Niðanfyri verður sálmurin prentaður við teimum upprunaligu seks ørindunum, soleiðis sum hann fyrst varð kendur frá Ungdómssangbókini frá 1929.

Seinni hevur fjórða ørindini ikki verið tikið við.

Jólaklokkan aftur ringir,
kallar øll til kirkju brátt;
lat nú alt, sum hjartað tyngir,
hvørva burt sum myrka nátt.

Stjørnur yvir okkum lýsa
bjart sum hina jólanátt,
vilja okkum vegin vísa
til Várharra ljósa slott.

Jesusbarnið, føtt í fjósi,
barnaeygað sær so bjart,
jólaboðið, jólaljósið
treingja gjøgnum hjartað hart.

Kundu vit við barnasinni
hildið ljós við einglasang,
o, tá skuldi jólaminnið
vaksið upp til jubilklang.

Gongur tú á tungum vegi,
bangnir tankar treingja inn,
einki kann sum jólagleði
lýsa upp títt myrka sinn.

Hoyr hin væna einglasongin
ljóða við hvørt klokkuslag,
tá skal vónin lætta vongin
rætt sum fyrsta jóladag.

Jakob Jakobsen hevur yrkt sálmin til lag eftir týska tónaskaldið Friedrich Silcher (1789-1860). Lagið er vorðið kent í Danmark og Føroyum saman við danska sanginum: "Jeg har båret lærkens vinge."

Við hesum lagnum er sálmurin vorðin kendur millum føroyska fólkið, mest frá Ungdómssangbókini.

Tey seinnu árini eru komin tvey føroysk løg til sálmin, sum fólkið við gleði hevur tikið við. Annað hevur Hans Jacob Højgaard (1904-1992) gjørt. Hitt lagið hevur tónaskaldið Knút Olsen f. 1945, ættaður úr Sandavági, gjørt í 1972.

Vit vita ikki nógv um skaldskapin hjá Jakob Jakobsen, men hesin sálmur fer at standa sum ein føgur blóma í okkara sálmabók.

Í hesum sálminum gleðir skaldið seg um, at jólini nærkast. Jólaklokkan, t.e. kirkjuklokkan boðar frá hesum. Hon kallar øll til gudstænastu. Lærarasinnið kemur fram í skaldinum, har hann sigur:

"Lat nú alt sum hjartað tyngir, hvørva burt sum myrka nátt."

Skaldið man eisini tala av egnum royndum, tí sjálvur var hann heilsubrekaður í nógv ár og varð tí noyddur at leggja lærarastarvið frá sær bara 63 ára gamal.



*JAKOB JAKOBSEN*
*F. 28. MARTS 1953*
*2. DESEMBER 1932*

*ANNA JAKOBSEN*
*FØDT KJELNÆS*
*F. 5. SEPTEMBER 1854*
*D. 5. OKTOBER 1939*



*Handilin hjá Johan Mortensen á Tvøroyri. Johan var giftur við Susannu, fastur Jakob*



*Susanna, fastur Jakob, gift við undangongumanninum og reiðaranum Johan Mortensen*

*Keldur:*
Elgerda Jacobsen:
Skúlaskapur í Froðbiar sókn
Johs. Andr. Næs:
Jólaklokkan aftur ringir
Viggo Christiansen:
Ættartalvur
Hans Jacob Debes: Nú er stann stundin……
Lærarafólk í Føroyum

**Næstu ferð**
Í komandi parti verður greitt frá Enok D. Bærentsen. Hann var keypmaður og politikari. Hann var ein av innbjóðarunum til jólafundin í 1888. Eisini var hann pápi einasta føroyska amtmannin Christian Bærentsen